# Hampuligt á einkulstartinum



*Gunnar Dahl-Olsen var besti føroyski súkklarin í einkultstartinum sunnudagin. Hann gjørdist nummar 18 av teimum 43 luttakarunum, sum komu á mál*

**Føroysku súkklararnir fingu ikki heiðursmerki á einkultstartinum, men í sterka feltinum var hetta heldur ikki væntandi**

SÚKKLING
*Álvur/Jákup*

Guernsey: Sum fyrsta kappingin sunnudagin var einkultstarturin í súkkling avgreiddur sunnumorgunin á L'Eree, sum liggur á útnyrðingshorninum Guernsey.

Heilt uttan dramatikk var hendan kappingin ikki. Og einamest var hetta orsakað av smølu vegunum, sum fleiri av fremmandafólkunum hava havt nakað av fortreð av. Fyri Terry Wright av Guernsey kom tað í øllum førum dátt við, at ein bilur brádliga sneiddi fram fyri hann. Úrslitið var ein samanstoytur, og tó at hesin tíbetur ikki var so álvarsligur, at súkklarin fekk nakran snudd, so fekk hann ikki hildið fram í kappingini. Seinnapartin sunnudagin kom løgreglan við almennari útmeldan, og hendan tókist sýna, at tað var súkklarin sjálvur, sum hevði ábyrgdina av hesum. Í øllum førum varð sagt, at vegurin var opin, og at tað so í øllum førum ikki var bilførarin, sum hevði gjørt nakað skeivt.

Tíbetur sluppu føroysku luttakararnir undan slíkum slag av dramatikki. Føroyingarnir í kapping sunnudagin vóru tríggir í tali. Gunnar Dahl-Olsen, Eli Christiansen og Sverri Mohr Edvinsson.

Av teimum trimum var Gunnar tann, sum hevði bestu tíðina. Ein tíma, seks minuttir og 32 sekund tók tað honum at gjøgnumføra teinin, og hetta rakk til eitt pláss sum nummar 18 á listanum yvir teir 43 súkklararnir, sum komu á mál. Fremstur av hesum var sum vant Andrew Roche av Isle of Man, sum er í einum flokki fyri seg í einkultstartinum. Tíðin hjá hesum var 1.00.45, og tað var nærum hálvan annan minutt betri enn næstbesti súkklarin.

Sverri Mohr Edvinsson kom á mál við tíðini 1.10,18, og rakk tað til eitt pláss sum nummar 28, meðan Eli Christiansen kom á mál sum nummar 34 við 1.12,52.

Bogi Kristiansen og Jens Sigurd Simonsen tóku ikki lut í krevjandi einkultstartinum, soleiðis at teir ístaðin kunnu spara nakað av kreftum til komandi kappingarnar.

# Sólvá gekk á odda



**Tað var ein av gyltu fótbóltskvinnunum hjá Føroyum, sum fekk heiðurin av bera merkið inn til setanina**

FLAGGBERI
*Álvur/Jákup*

**Guernsey:** Tað var Sólva Joensen av føroyska kvinnulandsliðnum í fótbólti, sum hesa ferð fekk heiðurin av at bera Merkið til oyggjaleikasetanina.

Sjálv hevði hon vitað av hesum í eina viku undan leikunum, og hon duldi ikki fyri, at hetta kendist sum ein stórur heiður.

- Tá eg varð spurd um hetta, nýtti eg ikki langa tíð um at taka av. Tað er í øllum førum ikki nakað, sum tú fært møguleikan fyri fleiri ferðir, og sjálvandi er tað ein stórur heiður, segði ein stolt Sólvá, beint sum setanin var liðug.

Um hetta segði hon annars, at tað, sum hon einamest óttaðist, var, at tað skuldi verða ov tungt hjá sær at bera Merkið undir allari setanini.

- Eg hevði avtalað við Heðin, at hann skuldi halda seg nærhendis mær, um so var, at eg ikki orkaði at bera, men tað gjørdist so tíbetur ikki neyðugt, sjálvt um nú eri nóg so troytt í armunum. Men nú er so bara at hvíla. Fyrsti dysturin hjá okkum er longu í morgin (sunnudagin, blðm.) og tað er so ikki nakað, sum vit kunnu loyva okkum at taka lætt uppá. Vit hava jú eitt gullmerki frá seinast at verja, segði Sólvá Joensen at enda.

## Heini og Hallur skaddir

Tveir av føroysku rennarunum í frælsum ítrótti, Heini Hátún og Hallur Holm, eru ikki við á oyggjaleikunum í ár. Teir vórðu báðir skaddir stutt undan fráferð, og hava ikki runnið síðani skaðin tók seg upp. Talið av ítróttarfólkum í frælsum ítrótti er tískil á níggju ístaðin fyri ellivu.

## Quote of the day:

Í fjølmiðladeplinum á St. Pierre Park Hotel er nakað, sum verður rópt »Quote of the day«. Tann fyri sunnudagin ljóðaði soleiðis:

»Vit mugu taka hvønn dyst, sum hann kemur...«, sagt av fótbóltsvenjaranum hjá Sark, tá hansara lið tapti 19-0 ímóti Gibraltar fyrstu ferð teir spældu á oyggjaleikunum.





*Rannvá Andreasen skeyt fýra av teimum ellivu føroysku málunum sunnudagin*

Føroyar-Isle of Man 11-0 (7-0):

# Byrjaði sum endurtøka

**Eftir nakrar trilvandi minuttir gjørdu føroysku fótbóltskvinnurnar bart, tá tær skutu Isle of Man sundur og saman**

FÓTBÓLTUR
*Álvur/Jákup*

**Guernsey:** Tá føroysku fótbóltskvinnurnar í fjør vunnu gull á Isle of Man byrjaði alt við einum knúsandi 10-0 sigri á vertunum.

Aftur hesa ferð var tað Isle of Man, sum var fyrsta mótstøðuliðið, og aftur hesa ferð gjørdist talan um sanna avbuking. Hesa ferð við einum máli fleiri.

Fyrstu lítlu løtuna var tó ikki so nógv, sum bendi á, at Føroyar skuldu verða so mikið sannførandi hesaferð. Isle of Man royndu alt fyri eitt at seta trýst á føroysku verjuna, og bert ein stórbjarging av Annu Kristinu Joensen í málinum forðaði Isle of Man í at leggja seg á odda eftir frísparksinnlegg úr høgru.

Føroyska spælið tóktist heldur ikki serliga sannførandi hesa fyrstu løtuna. Kanska var tað trýstið yvir favorittleiklutin, sum tyngdi føroysku kvinnurnar, men eftir fyrsta málið gjørdist alt hetta tó munandi betri.

Hesum fyrsat kassanum syrgdi match-vinnarin frá finaludystinum í fjør, Malena Josephsen, fyri, og so gekk bara ein veg. Tríggjar minuttir seinni høvdu Vivian Bjartalíð og Halltóra Joensen trífalda leiðsluna, og so var tað bara ein spurningur um stødd á sigrinum.

Talan gjørdist altso um ellivu kassar í hesum fyrsta dystinum, men meira enn øll málini, so mundu landsliðsvenjarin, Álvur Hansen, fegnast um, hvussu væl nýggja samasetingin á liðnum riggaði. Ikki minst miðvøllurin, har Eyðvør úr Dímun er einasta eftirverandi av liðnum fyri tveimum árum síðani, fann skjótt rætta stevið. Nýggja samansetingin í verjuni kom ongan tíð av álvara at standa sína roynd, men í øllum førum tykist framrættaði parturin her at vera í lagi við Sólvu og Silju á hvør sínum borði, og eitt álop við Halltóru og Malenu er í øllum førum garantur fyri hørðum arbeiði gjøgnum heilan dyst, og so er ofta, at okkurt munagott spyrst burturúr.

### Maibritt á skaðastovuna

Einasta skeinan í so máta mundi vera tann, sum Maibritt Olsen fekk oman fyri eygað, stutt eftir at hon kom á vøllin. Hon varð skumpað um koll, og fallið var somikið óheppið, at hon umvegis knæið á Sólvá Joensen fekk eitt sár, sum kravdi tríggjar pentur á skaðastovuni.

Tá vit seinast frættu, tóktist skaðin ikki at vera heilt so álvarslivur, sum tað av fyrstan tíð tóktist, men tað er nokk illa hugsandi, at hon skal royna seg í dysti longu aftur týsdagin, tá fótbóltskvinnurnar aftur skulu í eldin.

### Dysturin í tølum

**Føroyar-Isle of Man 11-0 (7-0)**

1-0: Malena Josephsen
2-0: Vivian Bjartalíð
3-0: Halltóra Joensen
4-0: Halltóra Joensen
5-0: Rannvá Andreasen
6-0: Rannvá Andreasen
7-0: Halltóra Joensen
8-0: Malena Josephsen
9-0: Malena Josephsen
10-0: Rannvá Andreasen
11-0: Rannvá Andreasen

**Føroyar:** Anna Kristina Joensen – Sólvá Joensen, Bára S. Klakstein, Ragna Andrerasen, Silja á Borg – Heidi Heinesen, Eyðvør úr Dímun, Rannvá Andreasen, Vivian Bjartalíð - Halltóra Joensen, Malena Josephsen

Badminton:

# Stórsigur á Bermuda

**Føroysku badmintonspælararnir vunnu stórsigur á Bermuda sunnudagin. Úrslitið gjørdist 5-0 til Føroyar, men hinvegin, so taptu føroysku spælararnir eisini 5-0 ímóti Guernsey**

BADMINTON
*Álvur/Ingrid*

**Guernsey:** Sunnudagin byrjaði liðkappingin í badminton. Føroysku leikararnir byrjaðu við dysti seinnapartin, og tá var tað Bermuda, sum skuldi vinnast á.

Hesa uppgávuna kláraðu føroysku spælararnir til lítar, tí endaliga úrslitið gjørdist 5-0.

Í kvinnudoublini vunnu Guri Poulsen og Guðrun Jacobsen ávíkavist 15-1 og 15-1.

Ingun Hansen vann 11-0 og 11-1 í kvinnu-single, meðan Bjartur Lamhauge og Aksel Poulsen bastu Bermuda við ávíkavist settúrslitunum 15-3 og 15-6.

Í blandaðari double spældu Erland Poulsen og Guri Poulsen, og tey vunnu settini 15-4 og 14-0

Seinast var harra-single á skránni, og slapp Ragnar Rasmussen tá at royna seg. Hann sveik ikki álitið og vann settini 15 ímóti ongum báðu ferðirnar.

Staðfestast kann lættliga, at spælararnir frá Bermuda eru á einum væl lægri støði enn føroyingarnir, sum ikki tóktust at hava tað torført í dystunum.

### Tap

Eftir stórsigurin á Bermuda stóð ein heldur torførari uppgáva fyri framman. Føroysku spælararnir skuldu nú møta Guernsey sum eru sterkari enn føroyingar í badminton.

Hesuferð gekst heldur ikki so væl. Føroyingar taptu 5-0.

Í kvinnudoublini taptu Guri Poulsen og Gurðun Jacobsen 15-1 og 15-3.

Kvinnu-single endaði við, at Ingun Poulsen tapti 11-2 og 11-1.

Í mans-double taptu Bjartur Lamhauge og Aksel Poulsen tvær ferðir 15-6, meðan blandaða doublan tapti 15-6 og 15-10.

Ragnar Rasmussen var aftur seinastur á vøllinum hesuferð, og hann tapti settini 15-8 og 15-5.

Føroysku spælararnir eru tískil útslignir, og eru ikki komnir víðari í liðkappingini.

Badmintonleikararnir skulu aftur í eldin mikudagin tá harra-single og kvinnu-single er á skránni.



*Ragnar Rasmussen spælir her ímóti einum av spælarunum frá Bermuda. Hann vann bæði settini 15-0*